LØGMANSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Tórshavn, tann: 30. november 2020
J. nr.: 0617-010/18-96
Viðgjørt: GMN

Uppskot til nýggjar orðingar í revsilógini

§ 98. Tann, sum fremur eina gerð, ið miðar eftir við útlendskari hjálp, við valdsnýtslu, við hóttan um valdsnýtslu ella á annan løgleysan hátt at fremja kvett ímóti ella at leggja Føroyar ella partar av Føroyum undir fremmant vald verður revsaður við fongsli í upp til lívstíð.
Stk. 2. Eftir ásetingini í stk. 1 verður eisini tann revsaður, sum við nevnda endamáli skipar fyri umfatandi sabotasju, framleiðslustongsli ella ferðslustongsli, og tann, sum luttekur í slíkum virksemi og er vitandi um endamálið við tí.

§ 110 e. Við sekt ella fongsli í upp til 2 ár verður tann revsaður, sum alment háðar fremmanda tjóð, fremmant land, flagg tess ella annað viðurkent tjóðarmerki ella flaggið hjá Sameindu Tjóðum ella hjá Evroparáðnum.

§ 111. Tann, sum fremur eina gerð, ið miðar eftir við útlendskari hjálp, við valdsnýtslu, við hóttan um valdsnýtslu ella á annan løgleysan hátt at broyta stýrisskipanina ella at seta hana úr gildi, verður revsaður við fongsli í upp til lívstíð.

Til § 98
§ 98 skal skiljast við støði í tí samanhangi, sum ásetingin er sett inn í. Tað vil siga, at talan er um landasvik og onnur brotsverk ímóti sjálvsavgerðarrætti og trygd Føroya fólks.
Ásetingin skal sum heild verja sjálvsavgerðarrætt og trygd Føroya og verjur sostatt ytru og innaru trygdina í landinum ímóti álopum og hóttanum.

Landasvik verður vanliga allýst sum grovt brotsverk ímóti einum landi ella landsmyndugleikum, sum ger seg inn á trygdina ella sjálvsavgerðarrættin hjá einum landi.

Revsiverda gerðin í ásetingini er tríbýtt: Útlendsk hjálp, valdsnýtsla ella hóttan um valdsnýtslu og annar løgleysur háttur.

Útlendsk hjálp skal skiljast sum ólóglig útlendsk hjálp. Tað vil t.d. siga við fíggjarligum tvingsli og øðrum tvingsilsfyriskipanum, sum avbyrging og politiskt trýst.

Við valdsnýtslu og hóttan um valdsnýtslu meinast ikki einans við vápnamegi og nýtslu av harðskapi, men eisini víðfevnd tvingsilsráð sum t.d. aðalverkfall. Tað krevst tó, at endamálið við valdsnýtsluni ella hóttanin um valdsnýtslu er at fremja kvett ella leggja Føroyar ella partar av Føroyum undir fremmant vald.

Skotið verður upp, at leggja afturat ásetingini, at gerðin skal vera framd á ein løgleysan hátt. Hetta er fyri at vísa, at talan t.d. ikki er um vanligt millumlanda politisk samstarv við ein flokk í einum øðrum landi.

Gerningsløtan er sambært ásetingini flutt fram í tíð og tilætlan um at leggja Føroyar ella partar av Føroyum undir fremmant vald ella at fremja kvett er sostatt nokk, til at fremja revsiverdu gerðina.
Vandin fyri sjálvsavgerðarrættin og trygdina má tó vera ítøkiligur og nærliggjandi.

Øll Norðurlond hava líknandi ásetingar sum hesa. Tílíkar ásetingar eru í Noregi og Svøríki eins og í Danmark, gjørdar aftaná 2. heimsbardaga og spretta úr royndunum, sum londini høvdu við uppgerðini aftaná heimsbardagan. Ætlanin við hesum ásetingunum er tí í størstan mun at verja frið og sjálvsavgerðarrætt í hesum londum.

Tá ið revsilóggávan varð yvirtikin, varð í viðmerkingunum til yvirtøkulógina gjørt greitt, at avgerð um átalu eftir kapitli 12 og 13 eigur at liggja hjá danska løgmálaráðharranum, tí atlit kunnu vera at taka til fremmandavald.
Í yvirtøkulógini er eisini lagt til grundar, at kapittul 12 og 13 í føroysku revsilógini ikki eiga at víkja grundleggjandi frá donsku lóggávuni. Í hesum liggur tó einki krav um, at lóggávan skal vera einsljóðandi.
Føroyar hava sostatt, í sambandi við yvirtøkuna, bundið seg til, at kapittul 12 og 13 í revsilógini, ikki mugu víkja grundleggjandi frá donsku lóggávuni. Hetta er tó bert galdandi fyri kapittul 12 og 13.

Orðingin "at bringe den danske stat eller nogen del af denne under fremmed herredømme eller at løsrive nogen del af staten" er broytt til "at fremja kvett ímóti ella at leggja Føroyar ella partar av Føroyum undir fremmant vald". Orðingin er ein tillaging til føroysk viðurskifti og hevur við sær, at ásetingin nú einans viðvíkur brotsverkum ímóti Føroyum. Valt er eisini at nýta orðingina "kvett" fyri "løsrivelse" fyri at gera greitt, at talan ikki er um at arbeiða demokratiskt fyri at loysa Føroyar frá Danmark.

Við "Føroyar" skal skiljast "Føroya land" sum ein parallellur til "danska statin". Tað merkir, at hugsað verður ikki bara um landið, men eisini um t.d. sjóøkið, myndugleikar og jurisdiktión umborð á føroyskum førum. Í norsku revsilógini verður somuleiðis heitið "Noreg" nýtt og ikki "norski staturin".
Danski staturin fevnir um Danmark, Føroyar og Grønland, og orðingin í galdandi lóg er í samsvari við hetta. Hóast Føroya land skal skiljast sum ein parallellur til "danska statin", so eru Føroyar ikki eitt sjálvstøðugt ríki, og neyðugt hevur tí verið at umorðað ásetingina í ávísan mun. Ætlanin er ikki at gera aðrar broytingar í ásetingini.

Brotsverk ímóti danska statinum og myndugleikum hansara eru fevnd av § 110 g.

Til § 110 e
Løgmansskrivstovan er gjørd varug við, at talan upprunalig er um ein áseting frá 1961, tað vil siga áðrenn Danmark gjørdist partur av Evropasamveldinum. Talan er sostatt ikki um "flaggið hjá Det Europæiske Råd" sum hoyrir undir Evropasamveldið, men um flaggið hjá Evroparáðnum, sum er ein stovnur undir ST, sum Føroyar eru partur av.

Tað verður tí mælt til at seta “flaggið hjá Evroparáðnum” inn aftur í ásetingina.

Til § 111.
Ásetingin er nærum einsljóðandi við § 98, men viðvíkur brotsverk ímóti stýrisskipanini.

Av tí at mælt verður til at broyta orðingina í § 98, verður mælt til at gera tað sama í § 111, soleiðis at orðaljóðið verður eins og tað verður undirstrika, at útlendsk hjálp skal skiljast sum ólóglig hjálp.

Tað er annars ikki ætlanin, at gera innihaldsligar broytingar.